## UTTAN ÚR HEIMI

### Tók ikki av hjálp

Síðani ta ógvusligu spreingingina í síðstu viku hevur Norðurkorea fingið hjálp úr fleiri londum og frá fleiri altjóða felagsskapum.

Norðurkoreansku myndugleikarnir hava tikið av hjálp úr øllum heraðshornum, men teir hava gjørt greitt, at teir vilja ikki hava hjálp frá grannalandinum Suðurkorea. Reyði Krossur í Suðurkorea hevði boðið sæt til at veita hjálp fyri einar seks milliónir krónur, men ein fundur við teir norðurkoreansku myndugleikarnmar um hjálpina endaði úrslitaleysur. Tí var hjálpin av ongum.

Harafturímóti hevur Norðurkorea tikið av einum tilboði um hjálp úr Kina, sum eisini er grannaland hjá Norðurkorea. Fleiri kinesiskir lastbilar við hjálparútgerð hava verið í Norðurkorea, og læknar og ymsir serfrøðingar úr Kina eru eisini farnir um markið at veita hjálp, skrivar Reuters. Sambært norðurkoreansku myndugleikunum doyðu 161 fólk í spreingingini, og umleið 1.300 fingu skaða.

### Dámar ikki sviar

Tað var týðiligt, at amerikanska stjórnin og ovastin hjá ST-vápnaeftirlitsmonnunum í Irak, Hans Blix, sótu ikki serliga væl um sátt, og nú avdúkar tann kendi blaðmaðurin og rithøvundurin Bob Woodwaard orsøkina.

Í nýggju bókini "Plan of Attack" skrivar Bob Woodward, at ein av ráðgevunum hjá George W. Bush, forseta helt lítið um Hans Blix. Ráðgevin, sum eitur Karl Rove, er av norskari ætt, og tey søguligu viðurskiftini ímillum Noreg og Svøríki skuldu sambært Woodward vera orsøkin til, at Karl Rove hevði ikki álit á svium, og at hann helt lítið um Hans Blix.

Norskir diplomatar í USA ivast í hesari frágreiðingini. Teir halda ikki, at Karl Rove hevur nýtt tey gomlu søguligu viðurskiftini ímillum norðmenn og sviar í sínum arbeiði í Hvítu Húsunum.

### Tveittu egg eftir Le Pen

Tann víðgongdi franski høgrapolitikarin Jean-Marie Le Pen fekk eina sera kaldliga móttøku, tá hann sunnudagin var í Bretlandi og vitjaði.

Ørindini hjá Le Pen vóru at tosa við tann bretska tjóðskaparflokkin British National Party, sum fyrireikar seg til valið til ES-tingið seinni í ár. Fundurin teirra millum var í Manchester. Uttan fyri hotellið gingu fólk mótmælisgongu ímóti Le Pen og BNP, og tá franski floksformaðurin fór av hotellinum, tveittu mótmælisfólkini egg og annað eftir honum.

Jean-Marie Le Pen lat seg ikki ávirka av mótmælunum. Hann segði seg vóna, at British National Party fær fleiri umboð í ES-tingið, so tað fer at bera til at skipa ein sterkan tjóðskaparsinnaðan bólk í ES-tinginum.

### Skiftir verja

Amerikanska tónleikastjørnan Michael Jackson varð í síðstu viku ákærdur fyri at hava misnýtt børn kynsliga. Hann skal møta í rættinum tann 30. apríl, og hann hevur longu boðað frá, at hann fer at boða frá, at hann er ósekur.

Síðani løgreglan Santa Barbara í Kalifornia legði Michael jackson undir at hava misnýtt børn kynsliga, hevur hann hann sakførararnar Mark Geragos og Benjamin Bafimm at verja seg, men sunnudagin kunngjørdi hann, at hann hevur koyrt teir frá, og at hann hevur fingið sær annan verja. Tað er Thomas Mesereau, sum er ein tann best kendi verjusakførarin í USA.

Løgreglan í Santa Barbara hevur fyribils ákært Michael Jackson fyri at hava misnýtt tann tólv ára gamla Gavin Arvizo kynsliga. Hann og ein yngri bróður hansara hava greitt løgregluni frá, at Michael Jackson misnýtti teir. Amerikanskir fjølmiðlar siga, at teir báðir dreingirnir fara at fáa stórt endurgjald, verður Michael Jackson dømdur sekur í kynsligari misnýtslu.

# Nýggir SARS-tilburðir elva til stúran



*Minst tvey fólk í Kina eru deyð av SARS, og illgruni er um, at fleiri kunnu hava fingið sjúkuna*

*Mynd: Reuters*

**Heimsheilsustovnurin WHO stúrir fyri gongdini, nú lungnasjúkan SARS aftur er staðfest í Kina**

SARS
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tað hevur elvt til stúran hjá WHO, at teir kinesisku myndugleikarnir hava váttað, at tvey fólk hara hava fingið lungnasjúkuna SARS, og at seks onnur hava sjúkueyðkenni, sum minna um sjúkuna.

Leiðarin á WHO-deildini í Asia, Shigeru Omi, segði í gjár, at sjálvt um teir báðir tilburðirnir ikki beinleiðis eru ein heilsuvandi, er tað neyðugt at fylgja gongdini meiri neyvt, enn gjørt varð, tá sjúkan tók seg upp í fjør. Hann vísti á, at teir kinesisku heilsumyndugleikarnir hava illgruna um, at eitt fólk er deytt av SARS fyrr í ár, og at virusið møguliga er meiri mótstøðuført nú, enn tað var av fyrstan tíð.

Í síðstu viku váttaðu myndugleikarnir í Beijing, at ein 20 ára gamal sjúkrarøktarfrøðingur í høvuðsstaðnum og ein 26 ára gamal studentur í landslutinum Anhui eru deyð av SARS. Studenturin arbeiddi á einari rannsóknarstovu, sum millum annað fæst við at kanna SARS-virus. Sjúkrarøktarfrøðingurin arbeiddi á einum sjúkrahúsi í Beijing.

Mamma tann 26 ára gamla studentin doyði tann 19. apríl, og kinesisku myndugleikarnir hava illgruna um, at hon doyði av lungnasjúkuni. Illgruni er eisini um, at sjúkan kann hava breitt seg til fleiri skyldfólk hjá tí 26 ára gamla.

Sambært Shigeru Omi hevur ein 31 ára gamal lækni, sum arbeiddi á somu rannsóknarstovu sum studenturin, eftir øllum at døma fingið smittuna.

# Fartelefonir avdúka brotsmenn



*Fartelefonin hjálpir løgregluni at avdúka nógv brotsverk*

**Tær nýggju fartelefonirnar, sum kunnu taka myndir, eru vorðnar eitt sera hent amboð hjá løgregluni at avdúka brotsmenn**

LØGREGLA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Fartelefonin er vorðin ein sera góð hjálp hjá donsku løgregluni, tá tað ræður um at avdúka brotsmenn, og løgreglan roknar við, at tær nýggju fartelefonirnar, sum kunnu taka myndir, fara at gera tað uppaftur léttari at fáa fatur á brotsmonnum í framtíðini, skrivar Jyllandsposturin.

Per Larsen, sum er kriminalinspektørur hjá løgregluni í Keypmannahavn, sigur, at løgreglan fær nógvar fráboðanir frá fólki, sum hava fartelefon, og sum hava sæð eitt ella annað brotsverk, og hann mælir nú fólki til at taka eina mynd av sjálvum brotsverkinum, hava tey eina slíka fartelefon.

- Vit hava mælt fólki til at ringja til okkara, síggja tey eitt ella annað brotsverk, og hví ikki eisini mæla teimum til at trýsta á knøttin, so telefonin tekur eina mynd? Tað hevði verið ófrefst, høvdu vit fingið fólk til at nýta myndatólið, tá tey síggja ein tjóv, ein álopsmann ella okkurt herverk, sigur Per Larsen.

Á løgreglustøðini í Aarhus hava tey somu áskoðan. Allan Lind, kriminalovasti, sigur við Jyllandspostin, at har hevur løgreglan fingið nógv burturúr, at fólk ganga við fartelefon uppi á sær, og at tey tí hava møguleikar at boða løgregluni frá onkrum ólógligum, sum tey síggja. Hann vísir á, at tað hendir ofta, at bilar hjá løgregluni fáa boð um at venda og at fara onkra aðrastaðni, tí onkur við einari fartelefon hevur ringt og boðað frá onkrum.

Síðani fartelefonirnar við myndatóli komu á marknaðin, hevur dúgliga verið tosað um, at tær kunnu misnýtast, men sambært donsku løgregluni kunnu tær eisini vera sera hentar.



## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Tekniski Skúlin í Tórshavn:

# Tveir bilsmiðir fingið prógv handað

Fríggjadagin 24. apríl 2004 fingu tveir bilsmiðir handað prógv á Tekniska Skúla í Havn. Teir vóru: Tórolvur Samuelsen, Tórshavn, sum hevur staðið í læru hjá P/f Reyni Service í Hoyvík, og René Tórgarð, sum hevur staðið í læru hjá Ivan Johansen Bilum Havn.

Sum viðurkenning fekk Tórolvur Samuelsen mátitól frá P/F Wenzel og René Tórgarð fekk mátitól frá Reyni Service.



*Tórolvur Samuelsen og René Tórgarð fingu fríggjadagin handað prógv sum bilsmiðir*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

P/F Fjarhitafelagið:

# Móttøka í sambandi við stjóraskifti

**Fríggjadagin 24. apríl var móttøka á Parnassinum á Hotel Hafnia í sambandi við stjóraskifti í P/F Fjarhitafelagnum. Hans Christian Dam hevur tikið við sum stjóri eftir Jóannes Hansen, ið hevur røkt hetta starv síðan 1990**



*Fráfarni stjórin, Jóannes Hansen, og nýggi stjórin, Hans Christian Dam, á móttøkuni á Hotel Hafnia fríggjadagin*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*

Felagið bleiv stovnað av Tórshavanar Kommunu og SEV í 1988. Endamálið við felagnum er at veita fjarhita í Tórshavnar Kommunu og at gagnnýta avlopshitan frá Kommunalu Brennistøðini á Hjalla og elverkinum á Sundi. Í løtuni hevur Fjarhitafelagið 450 brúkarar, sum fyri tað mesta eru húsarhald í Hoyvíkshaganum. Nettosølan hjá felagnum er 3,6 milliónir krónur árliga.

Jóannes Hansen í Havn tók við sum stjóri í felagnum í 1990. Jóannes er ættaður úr Søldarfirði, hann er útbúgvin maskinverkfrøðingur við skipasmíð sum sergrein, og arbeiddi við fjarhita í Danmark, áðrenn hann fekk starv hjá Det Norske Veritas í 1965. Hann arbeiddi í Danmark, til teir fingu sína egnu skrivstovu í Føroyum í 1968. Tá bleiv hann leiðari hjá Det Norske Veritas í Føroyum. Hetta starv røkti hann, til hann tók við sum stjóri í fjarhitafelagnum. Hann var formaður í Orkuráðnum frá 1979, til ráðið bleiv tikið av fyrst í 90-unum. Jóannes er 68 ára gamal, nú hann leggur frá sær.

1. mars 2004 tók Hans Christian Dam í Havn við sum stjóri í P/F Fjarhitafelagnum.

Hans Christian er 44 ára gamal og havnarmaður. Hann er útbúgvin sum bilmekanikari, maskinmeistari og maskinverkfrøðingur.

Eftir at hann varð útbúgvin sum maskinverkfrøðingur í Odense, arbeiddi hann frá 1989-91 arbeiddi sum verkfrøðingur hjá ráðgevandi verkfrøðingafelagnum, Rambøll, í Keypmannahavn, har hann serliga arbeiddi innan fjarhita.

Hann hevur arbeitt sum maskinmeistari hjá SEV, og sum lærari á maskindeldini og økisleiðari á Tekniska Skúla í Havn.

Eitt skifti í 1999/2000 arbeiddi hann sum verkfrøðingur hjá Tórshavnar Skipasmiðju.

Síðan oktober 2002 hevur hann arbeitt sum verkfrøðingur hjá Fjarhitafelagnum.

Stjórin í Fjarhitafelagnum hevur um hendi dagligu leiðsluna av felagnum og skal saman við starvsfólkunum skipa fyri nýgerð og rakstri av felagnum umframt dagligu fyrisitingina. Somuleiðis skal stjórin taka lut á nevndarfundum og samstarva við formann felagsins.

### Dagurin

**27. apríl. Ánanias,** deyður í 375. Kristin munkur, sum varð tikin av døgum í Persiu. Summir halda, at her er talan um Ánanias, sum er umtalaður í Ápostlasøguni 9, 10-19.

*Fríðrikur Petersen doyði hendan dagin í 1917.*

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, ið sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá pápi okkara

**Egon Lorenzen**
Sandavági

andaðist og fór til gravar.

Eina stóra tøkk til Ingu Poulsen Dam, prest, fyri góð og troystarrík orð í kirkjuni.

Tøkk til kirkjutænarar og sangarar.
Tøkk fyri blómur og kransar og til tykkum øll,
sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

**Børnini**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, ið sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá elskaða mamma, omma og systir okkara

**Jonny Poulsen**
Sandavági

andaðist og varð jarðað.

Eina stóra tøkk til David Johannesen, prest,
fyri góð og troystarrík orð í kirkjuni.
Tøkk til kirkjutænarar og sangarar.
Tøkk fyri blómur og kransar og til tykkum,
sum lótu eina gávu til Sandavágs Kirkju.
Somuleiðis eina tøkk til tykkum øll,
sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

**Hjalmar, Maud, Maja og systrarnar**

†

Kunngjørt verður ætt, vinum og kenningum at kæra mamma, vermóðir og omma

**Emma Kruse**
f. Poulsen – ættað av Vatnsoyrum

andaðist á Ellisheiminum leygarmorgunin 24. apríl, 90 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Ebenezer
týsdagin 27. apríl kl. 13.00.

**Poul Einar, Una og Kristian**

Tey, ið ynskja at minnast Emmu kunnu lata eina peningagávu til Barnalegurnar í Grønlandi – konto í Føroya Banka.